LM-136/2020

Fylgiskjal 7

Tórshavn, tann 29. mars 2021

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Viðv. hoyringssvar viðvíkjandi løgtingslóg um veiðigjald.

Felagið Nótaskip hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um veiðigjøld.

Felagið hevur verið umboðað í arbeiðsbólkinum, ið gjørdi uppskotið til eina framtíðar veiðigjaldsskipan, og tekur tí undir við uppskotinum. Skipanin lýkur somuleiðis ynskið hjá vinnuni um, at tað skal bera til at avrokna hvønn einstakan túr endaliga.

Vit halda, at tað hevur eydnast at fáa semju millum politisku skipanina og vinnuna um eina skipan, sum er einføld og løtt at umsita hjá bæði almennu myndugleikunum og vinnuni.

Í arbeiðssetninginum hjá bólkinum varð ásett, at veiðigjaldið í 2021 skuldi verða ájavnt við samlaðu inntøkurnar frá veiðigjaldi og uppboðssølugjaldi í 2018, ella umleið 300 mió. kr. Í viðmerkingunum til uppskotið sigur Fíggjarmálaráðið, at tað metir, at í 2021 fara inntøkurnar frá veiðigjaldi og 3- og 8-ára uppboðssølukvotum við hesum uppskoti at verða á leið tað sama, sum roknað er við í fíggjarlógini, nevniliga góðar 300 mió. kr.

Í tilgongdini til at fáa eina semju í arbeiðsbólkinum millum politisku skipanina og vinnuna hevur sjálvsagt verið neyðugt at slaka í fleiri sjónarmiðum.

Eftir verandi skipan eru veiðigjøldini 1,50 kr./kg fyri makrel, 0,60 kr. fyri norðhavssild og 0,25 kr. fyri svartkjaft. Við miðal avreiðingarprísum 2019/2020 hevði veiðigjaldið fyri norðhavssild verið á umleið sama stigi, meðan veiðigjøldini fyri makrel og svartkjaft høvdu verið eitt sindur hægri.

Okkara sjónarmið er, at veiðigjøldini í Føroyum eru ov høg, og at tey eru kappingaravlagandi. Tey eru munandi hægri enn í okkara grannalondum, sum víst í talvuni niðanfyri.

Kr.	Føroyar	Ísland	Grønland
Makrelur	1,50	0,08	0,40
Norðhavssild	0,60	0,07	0,25
Svartkjaftur	0,25	0,003	0,15

Eftir okkara meting hava útrokningarnar, sum búskaparfrøðingar í almennu fyrisitingini og Búskaparráðið hava kunngjørt seinastu árini, eyðsýnt verið villleiðandi. Útrokningarnar hava víst, at veruliga tilfeingisrentan í vinnuni er omanfyri eina milliard. Hetta hevur skapt falskar vónir í politisku skipanini og í almenninginum um, hvussu nógvan pening landskassin kann fáa í gjøldum frá fiskivinnuni.

Sum nevnt omanfyri var kravið til nýggju skipanina, at hon í 2021 skuldi geva somu inntøkur í veiðigjaldi og uppboðssølugjaldi sum í 2018. Í politiska orðaskiftinum um veiðigjaldið er komið fram, at summir flokkar halda, at veiðigjaldið skal geva landskassanum munandi størri inntøkur.

Tí er hóskandi at gjøgnumganga útgreiningina, sum seinast varð gjørd í 2017. Tá roknaðu búskaparfrøðingarnir seg fram til, at samlaða tilfeingisrentan hjá fiskiflotanum var 1,2 mia. kr. av eini nettosølu upp á 2,8 mia. kr.

Tilfeingisrentan hjá trolaraflotanum hetta árið var roknað til 78 mió. kr. og hjá línuflotanum til 57 mió. kr. Veruliga støðan er, at nógv skip í hesum skipabólkum eru løgd, tí tølini á botnlinjuni eru reyð ella tí, at hýrurnar eru so vánaligar, at skipini ikki verða mannað. Tilfeingisrentan hjá rækjuskipum varð roknað til 54 mió. kr. Í 2020 var samlaða avreiðingarvirðið hjá rækjuflotanum 55 mió. kr. sambært hagtølunum hjá Vørn.

Nógv størst er roknaða tilfeingisrentan hjá uppisjóvarflotanum. Í 2017 varð hon roknað til at vera 821 mió. kr. av eini nettosølu upp á 1,5 mia. kr.

Hyggja vit nærri at fyritreytinum, sum útrokningarnar fyri uppsjóvarflotan byggja á, so eru tær eyðsýnt skeivar.

Ein fyritreyt er, at ein miðal normalløn á einum uppisjóvarskipi er 400.000 kr. Verður henda upphæddin útgreinað eftir yvirmannapørtunum í verandi sáttmálum við manningafeløgini, so hevði árshýran hjá einum dekkara verið góðar 250.000 kr. um hann var mynstraður alt árið. Hetta svarar umleið til galdandi minstuløn. Við hesi hýru høvdu uppsjóvarskipini ikki verið mannað. Verður miðal hýran sett til 800.000 kr, so minkar tilfeingisrentan við 67 mió kr.

Í útrokningunum er ein onnur fyritreyt, at tað eru 166 ársverk í uppisjóvarflotanum. Veruleikin er ein annar. Við flestu uppisjóvarskipunum eru tvey ársverk fyri hvønn mann umborð, og tí eiga ársverkini í minsta lagi at vera 360. Verður henda fyritreytin løgd inn í útrokningina, so minkar tilfeingisrentan við 155 mió. kr. afturat.

Víðari er ein fyritreyt í útrokningunum, at normalur profittur er 6%. Spurningurin er, um hetta er nóg mikið til at endurnýggja flotan. Verður normalur profittur settur til 10%, so hevði tilfeingisrentan minkað við 54 mió. kr. afturat. Harumframt verður normali profitturin roknaður av bókaða skipavirðinum, sum í 2017 var tilsamans 2,7 mia. kr. fyri allan flotan. Vit hava í fleiri skipabólkum ein fullkomiliga niðurslitnan flota, og hevði ein náttúrlig endurnýggjan havt verið farin fram, so hevði bókaða skipavirðið verðið munandi hægri. Síðan nýggja sjófeingislógin kom í gildi, eru sáttmálar gjørdir um tríggjar nýbygningar til flotan í Barentshavinum og sáttmáli um ein nýbygning til nótaflotan. Samlaði kostnaðurin av hesum skipum er uml. 1,5 mia. kr.

Harumframt eru roknskapartølini ikki reinsað fyri inntøkur, sum reiðaríini hava frá øðrum virksemi enn at reka fiskivinnum, og tey eru heldur ikki reinsað fyri óviðkomandi lønarútreiðslur.

Vit vilja við hesi gjøgnumgongd bara vísa á, at tað er sera óheppið, at politiska og almenna orðaskiftið um tilfeingisrentuna byggir á útrokningar, har fyritreytirnar eyðsynt eru skeivar.

Vinarliga
Jógvan Jespersen,*stjóri*

NÓTASKIP

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tíórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: notaskip@notaskip.fo
www.notaskip..fo